# Ferðavinnan kann fáa óhepnar avleiðingar fyri náttúruna á Svalbard



*Umhvørvisverndarfelagsskapir halda lítið um ætlanina at flyta fleiri ferðafólk til Svalbard, tí náttúran har er so viðbrekin (Mynd: Polfoto)*

**Minst tvey flogfeløg ætla at økja ferðirnar til Svalbard í summar, men Norska Náttúruverndarfelagið og Greenpeace mæla frá**

FERÐAVINNA
*Árni Joensen*
*arnisosialurin.fo*

Skandanaviska flogfelagið SAS og tað norska Norwegian hava boðað frá, at tey fara at leggja fleiri ferðir til Svalbard inn í summarferðaætlamnina í ár. Men tað fellur ikki í góða jørð allastaðni.

- Tað er ikki serliga heppið, at flogfeløgini nú fara at kappast um prísin fyri eina ferð til Svalbard, sigur formaðurin í Norges Naturvernforbund, Lars Haltbrekken, við kringvarpið NRK. Hann ber ótta fyri, at ein veksandi ferðavinna fer at órógva fugla- og djóralívið í oyggjunum.

- Svalbard er eitt sera týðandi náttúruøki, og tað er umráðandi, at ferðafólk fáa nøkur mál, sum tey skulu halda, tá tey vitja har, sigur Lars Haltbrekken.

Í Greenpeace eru tey heldur ikki serliga fegin um ætlanina at fáa fleiri ferðafólk at vitja Svalbard, sigur Frida Bengtsson, sum er ráðgevi hjá felagsskapinum.

- Hetta er ein gongd, sum ikki hóvar okkum. Vit tosa jú um eitt náttúruøki, sum kanska skal hava serliga góða vernd, sigur hon við NRK.

## Órógvar ikki

Sum er flýgur SAS til Longyarbýin á Svalbard alt árið, og Norwegian ætlar sær at skipa fyri tveimum ferðum til Svalbard um vikuna í summar. Kunningarstjórin hjá SAS í Noregi, Morten Johansen, sigur, at Svalbard er eitt týdningarmikið ferðamál hjá felagnum. Felagið hevur upp til 13 ferðir um vikuna millum Oslo, Tromsø og Svalbard.

- Flúgvingin hevur ikki bara stóran týdning fyri lokalsamfelagið, men eisini fyri ferðavinnuna, sigur Morten Johansen.

Í Norwegian halda tey ikki, at teirra summarferðir fara at órógva umhvørvið á Svalbard.

- Gistingarmøguleikarnir á Svalbard eru so avmarkaðir, og harafturat eru fleiri tiltøk longu galdandi, so nakrar flogferðir afturat fara ikki at órógva umhvørvið, sigur talskvinnan hjá Norwegian, Anne Grete Ellingsen, við norska kringvarpið.

Sýslumaðurin á Svabard, Per Sefland, hevur einki ímóti at fáa fleiri ferðafólk til Longyarbýin. Tvørturímóti.

- Tað mugu vit royna at klára. Nógv ferðafólk hava keypt pakkaferðir, sum ber í sær, at tey hava staðkendan ferðaleiðara. Hetta er væl skipað, og higartil hava vit havt fult tamarhald á støðuni, sigur sýslumaðurin við NRK.

# Føroya Kolvetni borar spennandi brunn í Noreg

OLJUVINNA
*Hilmar Simonsen*

Við StatoilHydro sum fyristøðufelag er Føroya Kolvetni fari at bora ein spennandi brunn á norska landgrunninum. Talan er um loyvi PL271 í Yoda-prospektinum í norska partinum av Norðsjónum.

Føroya Kolvetni sigur í tíðindaskrivi, at Yoda er eitt spennandi øki, har nógv olja verður framleidd í løtuni – til dømis Ula, Gyda og Rev.

Í loyvinum hjá Føroya Kolvetni eru eisini "upside" møguleikar. Tað vil siga, at verður olja staðfest, so kann framleiðslan økjast munandi við fleiri framleiðslubrunnum. Yoda liggur í einum øki við góðum infrastrukturi bæði norsku og bretsku megin.

- Tað frøir okkum at boða frá, at vit eru byrjað at bora í Yoda loyvinum. Hendan ætlanin er í tráð við strategiina hjá Føroya Kolvetni at byggja eina loyvisportefølju upp í Noreg, og at luttaka í boringum við stórum potentiali, sigur Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum plc.

Tað fer eftir ætlan at taka 73 dagar at bora og testa brunnin. Føroya Kolvetni eigur 15 prosent í hesum loyvinum.

*Boringin hjá Føroya Kolvetni er í loyvi PL271 í norskum øki*



Boringin hjá Føroya Kolvetni er í loyvi PL271 í norskum øki.